# Skomm at flyta 10.flokk

**HARALD JOENSEN**

Vit eru farin undir tað síðsta árið í fólkaskúlanum, sum endar við fráfaringarroynd fólkaskúlans. Tann dagliga skúlagongdin er tí eisini nakað strævnari hjá bæði lærarum og næmingum.

Eitt stórt rós til Berg og Petur fyri at teir saman við øðrum hava gjørt 10.flokk spennandi, góðan, lærríkan og fantastiskan, sum hann er.

Eg eri ein vanligur drongur, sum gangi í 10. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla, eg haldi at tað er skomm at flyta hendan felagsskapin, sum er í 10. flokki í Kommunuskúlanum til Eystursk úlan. At allir 10. flokkar í Havnini skulu vera koyrdir saman í eina eind er nakað tvætl. Endamálið er kanska at niðurleggja 10. flokk í framtíðini? Ella at spara nakrar pengar har og so er eingin 10. flokkur.

Eg skilji ikki, hví man skal niðurleggja ein sera góðan og lærurikan máta at undirvísa 10. flokki í. Tað er eitt sera mennandi og spennandi ár, bæði hjá næmingum og ikki minst hjá lærarum og fyrisiting.

Næmingatalið veksur og veksur í Kommunuskúlanum, meðan tað minkar hjá øðrum skúlum í Havnini. Vit eru umleið 75 næmingar í 10. flokki í ár (2009/2010). Tað er met høgt ár hjá skúlanum. Tað er synd at bróta hesa uppbygging, sum fyrisiting og lærarar hava gjørt. Vit eru býtt upp í A, B og C flokkar, men eru sum ein eind tað vil siga at allir flokkar eru altíð saman.

Við tí í huga at menna 10. flokkarnar, so skulu teir ikki samanleggjast, men heldur gjørt eina eind í Eysturskúlanum og eina í Kommunuskúlanum, so kundu næmimgar úr hinum skúlunum í Tórshavnar Kommunu sjálvir avgjørt hvønn skúla teir vildu farið í.

Í Kommunuskúlanumum eru góðir karmar fyri undirvísing. Diskussiónir eru ofta uppi at venda, har ið vit viðgera spennandi evni í samband við tað sum vit hava tann dagin.

Vit hava viðrir t. d. felagsskapir, tolsemi, virðing, opinleika, erligheit og skemtingarsemi fyri hvørjum øðrum.

Dentur verður lagdur á, at næmingurin fær so nógv burturúr undirvísingini sum møguligt. Men trivnaðurin hevur minst líka nógv at siga. Undirvísingin í Kommunuskúlanum er skipað í blokkum, og tað er sera gott, tí so fær ein meira burturúr, eisini hevur skúlin í ár fyri fyrstu ferð spanskt á tímatalvuni og sum nakað heilt nýtt kunnu næmingar eisini taka Cambridge first certitficate í enskum, tann undirvísingin er í tøttum samstarvið við Fróðskaparsetrið.

Vit hava verið á seturskúla á Sandi, og var tað gott og lærurikt, har ið vit arbeiddi nógv saman í bólkum, fyri at læra hvønn annan uppaftur betri at kenna.

Tann 11. mars 2010 fara vit á námsferð til Prag í Kekkia, hetta er eisini vorðin siðvenja hjá Tórshavnar Kommunuskúla, at 10 flokkur fer hesa námsferð.

Skúlin hevur í ár sett pening av til umvæling av hølum, sum 10. flokkur skal húsast í. Tað verður nógv gjørt burtúr 10. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla. Eg haldi tað verða synd at niðurleggja hendan undirvísingar háttin og ikki minst felagsskapin. Tú kemur at læra nógv nýggj fólk at kenna og er tað sera gott.

Skal alt bara fella burtur í onki?

Vónandi verður 10. flokkur verandi í Tórshavnar Komunuskúla komandi árini.

Til síðst vil eg takka skúlanum, sum eg skjótt havi gingið í, í 10 ár fyri eitt SERA gott arbeiðið.

# Norðoyggjar, Eystur kommuna og Fuglafjarðar kommuna ein eind!



**JÓGVAN SKORHEIM**
varaborgarstjóri í Klaksvíkar Kommunu

**Um kommunurnar ikki kunnu skipa seg í størri eindir, fara vit at síggja eina rættuliga stóra miðsavnan tey komandi árini. Kommunuálitið er gott, men ikki nóg gott!**

Eftir at eg hevði lisið kommunuálitið, mátti eg tíverri staðfesta, at Norðoyggjar verða lagdar einsamallar í eina kommunu. Tó skal sigast, at eg hevði sætt at siga ikki væntað annað, tó at eg slett ikki eri samdur í hesari samanlegging. Eg hevði vónað, at álitið fór at vísa okkum, hvussu umráðandi tað verður, at skipa kommunurnar í stórar eindir fyri at tryggja javnstøðu fyri allar føroyingar.

**Týdningurin av størri kommunalum eindum?**
At eg so inniliga ynski, at Norðoyggjar leggja saman við Eystur- og Fuglafjarðar kommunu, er tí, at eg meti, at hetta økið samanlagt, hevur so ótrúliga nógv at bjóða – mentanarliga og vinnuliga. Harafturat hevur hvør kommuna sær nógv at bjóða, sum hinar kommunurnar kunnu njóta gott av. Fuglafjørður hevur ein framúrskarandi miðnámsdepil á Kambsdali, stórt mentanarhús, tungoljuvirki og gongur undan við nýggjari verkætlan við sólorku, vindmyllum og øðrum. Afturat tí hevur Fuglafjørður eitt ótrúliga sterkt vinnulív.

Eysturkommuna hevur bowlinghøll, sterkt vinnulív, G! Festival og nógv annað. Norðoyggja kommuna hevur hotell, sjómansheim, matstovur, biograf, svimjihøll, stórt bókasavn, ungdómshús, Dávavirkið við venjingarhølum til tónleik, Summarfestival, Sjómannadag, sjómannskúla, tekniskan skúla, sterkt vinnulív og sjálvandi eisini nógv annað.

Tað sum eg síggi, sum størsta fyrimun við samanlegging millum hesar kommunur, er at skipa økini soleiðis, at okkum ikki tørvar at gera somu íløgurnar fleiri ferðir. Hví skal Klaksvíkin byggja eina bowlinghøll, tá ið vit kunnu koyra 5 minuttir fyri at koma til Leirvíkar, ella hví skal Fuglafjørður gera biograf, heldur enn at koyra 15 minuttir til Klaksvíkar?

Í hesum trimum kommunum hava vit eisini 3 sterkar havnir, ið veruliga kundu nýtt ágóðan av hvørjari aðrari og staði sterkari í kappingini um at fáa ferðavinnuskip og vanliga uppskipan av vørum hendan vegin. Eg eri sannførdur um, at um vit ikki leggja kommunurnar saman, fara vit at brúka orku uppá at kappast við hvørja aðra.

Um vit harafturímóti velja at leggja saman, koma vit at verða eitt kraftsentur fyri norðara økið. Vit koma at vera ein sterk eind, sum hevur eina viftu av tilboðum til allar sínar borgarar, og eitt sterkt vinnu-, skúla-, sosial- og mentanarlív í rygginum.

**Tryggja javnstøðu**
Um kommunurnar í Føroyum skulu uppliva javnstøðu, verður tað alneyðugt við størri kommunum. Soleiðis sum kommuuálitið er samanskrúvað, fara kommunurnar at síggja soleiðis út:

Suðuroy
Sandoy
Tórshavn
Vágar-Streymoy ella
Vágar
Vestmanna-Kvívík
Eysturoy ella
Eystur
Skálafjørður
Sundalagið
Norðuroyggjar

Kanska er tað ikki rætt, at gera viðmerkingar til hvussu aðrar eindir skulu skipa seg, men fyri at tryggja javnstøðu kring landið, verður tað av stórum týdningi, at kommunueindirnar kunnu skipa seg størri um tær ynskja tað. Verður tað hinvegin ikki møguligt at skipa eindirnar størri, koma vit at síggja eitt miðstaðarøki, ið veksur, meðan útjaðarin minkar!

Ein sterkur útjaðari ger ein sterkan miðbý – høvuðsstað. Ein høvuðsstaður, har alt finnst og har alt er miðsavnað - við ongum útjaðara, er ein fátækur høvuðsstaður. Vit eru hóast alt 18 oyggjar, har so vítt gjørligt øllum skal verða lív lagað. Tí kann eitt øki sum Klaksvík, Norðuroyggjar, Leirvik, Gøta og Fuglafjørður hóskandi verða ein mennandi útjaðari, sum kann skapa sína natúrligu "sjálvstyrki", ið kann gagna útjaðaranum og miðøkinum.

Eg vóni, at tá ið kommunuálitið kemur til viðgerðar í tinginum, fara løgtingslimir at gera tað møguligt at skipa kommunurnar í størri eindir.



*Kjartan Stakksund*

# Alla halganna dagur

# Ævigt lív við trúnni á Jesus

Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt liv. Tí at ikki sendi Gud sonin í heimin, til tess at hann skal døma heimin, men til tess at heimurin skal verða frelstur við honum. Jóhs. 3,16–17.

Hesi orðini, Jóhs. 3,16, verða kallað tann lítla bíblian, og tað er heldur ikki so løgið, at so er, tí hetta versið inniheldur júst alla Guds frælsuætlan, tað at Gud sendi sín einborna son í heimin at frelsa mannaættina, sum var fallin í synd vegna tað at Adam og Eva vóru ólýðin mótvegis Gudi, og ótu av kunnskapartrænum, sum ikki var loyvt at eta av, og vóru tey rikin út úr aldingarðinum (Paradísinum) vegna synd.

Men Gud havi lov, hann hevur opnað vegin aftur til Paradísið og tað gjørdi hann við at senda sonin Jesus til jarðar, okkum til æviga frelsu og ævigt lív.

Tí kann eg heilsa tykkum, sum nú sita eftir við sorg og sakni við Jóhs. 11,26. Jesus segði við hana: »Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr; og hvør tann, sum livir og trýr á meg, skal aldri um ævir doyggja; trýrt tú hesum?« Jesus troysti og styrki tykkum í sorg og sakni tykkara, við vónini um at hittast aftur ein dag heima í Himlinum.

Og eg vil enda við einum Alla halganna sálmi yrktur til Alla halgannadag.

# Alla halganna sálmur

Lag: Bf. 227. Dk. 409. M. 856.

*Ein stórur skari við Guds trónu stendur,*
*í hvítum búna, pálmagrein í hond:*
*tey løgdu seg í Guds vár faðirs hendur,*
*tí lendu tey á himna føgru strond.*

*Óteljandi er hesin frelsti skarin,*
*sum heim er komin, hesum foldum frá;*
*frá vinum elskaðu tey eru farin,*
*til tess at vera faðir sínum hjá.*

*Á himni høga, gleði, sæla valdar,*
*ei sjúka, sorg og tregið eru har;*
*tey heima eru ævinnar ótaldar,*
*tí Jesus syndir teirra allar bar.*

*Tey lovsang syngja, um Guds stóru náði*
*at hann tey frelsti her í óndu verð;*
*har er ei nøkur freisting, nakar bági,*
*tí frelsan var í Jesu sáttargerð.*

*Kom tí mín vinur, bjarga tær frá deyða,*
*nú, meðan náðitíði tú hevur her;*
*lat tváa teg í Jesu blóði reyða,*
*tað einans móti lívsins landi ber.*

*Ei lívið her á foldum við skal vara*
*skjótt kallar Gud teg burt úr hesi verð;*
*skalt tú tá vera við í frelsta skara,*
*so mást tú frelstur vera longu her.*

**Kjartan Stakksund**